# Menningarástøði og hugmyndafrøði

## Brotmynd í 4 pørtum um vald og kyn við støði í bókmentaligari viðgerð

## *The Theory of Evolution and Ideology*

### *A Mosaic in Four Parts on Power and Gender Based on a Reading of Three Literary Texts*

*Kirsten Brix*

Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum. Email: kirsten.brix@skulin.fo.

### Úrtak

Menningarástøðið eftir Charles Darwin elvdi frá fyrsta degi til mótstøðu bæði frá vísindaligari og átrúnaðarligari síðu. Seinni hava rannsóknir innan fyri ymiskar vísindagreinir við nýggjari tøkni prógvað hansara niðurstøður, og menningarástøðið er viðurkent sum vísindaligt ástøði. Men hugmyndafrøðiliga heldur stríðið fram. Tann nýggjasta royndin at útihýsa menningarástøðinum frá undirvísingini í skúlum og øðrum lærustovnum er at fáa tað, sum verður nevnt intelligent design, viðurkent sum vísindaligt ástøði. Greinin viðger við støði í trimum bókmentaligum tekstum ymisk brigdi í tí hugmyndafrøðiliga stríðnum og vísir á, at stríðið ikki snýr seg um vitan og sannleikar, men um tamarhald og vald.

### Abstract

From the beginning, Darwin´s theory of evolution led to opposition from science and religion alike. Later, research carried out within different branches of science and using the most advanced technology has proved the validity of his conclusions and the theory of evolution has been established as a scientific theory. However, the ideological battle has far from ended. The most recent attempt to have the theory of evolution excluded from schools and other institutions of learning is having what is called intelligent design established as a scientific theory. Using three literary texts as points of departure, the writer deals with different aspects of this ideological battle and concludes that this is not, indeed, a controversy about knowledge and truth, but about control and power.

Menningarástøðið eftir Charles Darwin (1809-82), sum hann legði fram í verkinum *On the Origin of Species* í 1859, elvdi frá fyrsta degi til mótstøðu bæði frá vísindaligari og átrúnaðarligari síðu. Seinni hava rannsóknir innan fyri ymiskar vísindagreinir sum t.d. jarðfrøði, dýrafrøði og læknafrøði við nýggjari tøkni prógvað hansara niðurstøður, og menningarástøðið er viðurkent sum vísindaligt ástøði. Men hugmyndafrøðiliga heldur stríðið fram. Tann nýggjasta royndin at útihýsa menningarástøðinum frá undirvísingini í skúlum og øðrum lærustovnum er at fáa tað, sum verður rópt intelligent design viðurkent sum vísindaligt ástøði.

Greinin fer við støði í trimum bókmentaligum tekstum at viðgera ymisk brigdi í tí

hugmyndafrøðiliga stríðnum við tí fyri eyga at lýsa, hvørji evni hanga uppi í hesum stríði, og hvørji perspektiv eru í tí.

## 1. partur

Stuttsøgan "Móðurmerkið" (1843) eftir Nathaniel Hawthorne (1804-64) snýr seg m.a. um tað evnið, vit í dag rópa kynbót. Vísindamaðurin Aylmer er giftur við tí vøkru Georgianu, sum hevði verið tann fullkomni vakurleikin, hevði hon ikki havt eitt pinkulítið móðurmerki á øðrum kjálkanum. Aylmer verður so trásettur av hesum merki, ið hevur skap sum ein lítil hond, at hann bara sær tað, tá ið hann hyggur at konu síni. Aylmer er náttúruvísindamaður og *hevur rannsakað loyndarmálini í hægstu skýríkjum og djúpastu námum*[1], sum teksturin sigur. Hann hevur eisini roynt at fata ta tilgongd,

> *sum náttúran brúkar, tá ið hon savnar og sýgur upp øll síni dýrabaru árin, úr jørð og luft og úr andans heimi, so at hon kann skapa og ala menniskjað, sítt meistaraverk. Men hesa seinastu trá hevði Aylmer kortini langt síðan lagt til viks. Tí hann hevði við ringum tannabiti viðurkent tann sannleika – sum allir leitandi vísindamenn fyrr ella seinni detta um – at meðan okkara mikla, skapandi móðir stuttleikar okkum við, at síggja til, at virka í bjartasta sólskini, er tað henni strangliga um at gera at krógva síni loyndarmál, og at hon, hóast hon letist opinskáráð, bara vísir okkum úrslit. Hon loyvir okkum vissuliga at spilla, men sjáldan at bøta, og, sum ein kargur patenthavi, í ongum føri at skapa.*[2]

Men Aylmer er kortini sannførdur um sín førleika, og hann framleiðir ein løg, sum skal fáa móðurmerkið at hvørva. Georgiana drekkur løgin, og móðurmerkið hvørvur av kjálkanum, men úrslitið er, at hon doyr.

Í søguni verður sagt, at Georgiana hevði verið eitt dømi um *fullkomnan og púra lýtaleysan vakurleika*[3], hevði móðurmerkið ikki verið. Tað ófullkomna er menniskjans eyðkenni, náttúran vísir á henda hátt, at menniskjan er tíðarbundin og endalig. Fyri Aylmer verður móðurmerkið *ein mynd av tí óundansleppandi taki, sum feigdin tekur um jarðarinnar hægstu og reinastu skapningar fyri at lække teir og sameina teir í skyldskapi við tey lægstu kykt, og enntá við djórini, sum teir eisini líkjast í tí, at teirra sjónligu formar venda aftur til dust.*[4]

Aylmer hevur eina hugmynd av vakurleikanum, sum er absolutt. Tað er ein romantisk fatan, sum vísir aftur til Platon (uml. 428/27-348/47 f. Kr.). Í hansara líknilsi um hellið verður greitt frá, at tað, sum menniskjað sær og sansar, bara er skuggin av einum veruleika, sum tað ikki kann fata, men sum nøkur fá útvald kunnu hóma. Í romantikkinum eru tað serliga yrkjarar og listafólk, sum hava hesa gávu, men eisini tað einfalda natúrmenniskjað kann við síni intuitión hóma ein hægri veruleika, sum vit síggja tað t.d. í yrkingini "Guldhornene" (1802) eftir Adam Oehlenschläger (1779-1850). Í *Kritik der reinen Vernunft* brúkar Immanuel Kant (1724-1804) hugtakið *das Ding an sich* (tingið fyri seg) um tað absolutta, og tað, sigur hann, kann menniskjað ikki vita nakað um. Tað, sum menniskjað kann sannkenna, er tað, sum er givið, *das Ding für uns* (tingið fyri okkum), rópar hann tað.

Aylmer snávar, tí hann heldur seg kunna materialisera hugmyndina. Men halda vit okkum til Kant, kunnu vit siga, at hansara

ætlan má miseydnast, tí hon er ein contradictio in adjecto, ein sjálvmótsøgn.

Aylmer verður í síni vísindaligu hugmóð lýstur sum ein avmarkaður persónur. Hóast hann hevur staðfest, at náttúran krógvar síni loyndarmál, sum teksturin sigur, ætlar hann kortini at royna seg sum skapara. Hevði hann verið ektaður romantikari, hevði hann latið seg upp fyri náttúruni og hugtikin eygleitt hennara ríkidømi og margfeldi sum í ævintýrinum "Klokkan" (1845) eftir H.C. Andersen (1805-75), har tveir dreingir, vanliga tulkaðir sum yrkjarin sjálvur og náttúruvísindamaðurin H.C. Ørsted (1777-1851), hoyra náttúrunnar duldu rødd. Men sannkenningin hjá Aylmer er úrslit av rationellum rannsóknum, og sum hann sjálvur hevur staðfest, so geva tær ikki svar upp á ta gátu, sum hann hevur sett sær fyri at loysa.

Georgiana umboðar ikki somu náttúrufatan sum Aylmer. Tá ið hon um móðurmerkið sigur, at tað */kanska/ er so djúpt sum lívið sjálvt*[5], so peikar tað á eina heildarfatan, sum svarar til náttúruheimspekina hjá Friedrich Schelling (1775-1854). Eisini tænarin Aminadab, sum sagt verður um, at hann sýnist at umboða *menniskjans kropsligu natúr*[6] sýnist intuitivt at fata vandan í ætlanini hjá Aylmer, tá ið hann sigur: *Var hon kona mín, hevði eg aldrin sloppið mær av við hetta móðurmerkið.*[7]

## 2. partur

Í 1886 kom skaldsøgan *The Strange Case of Dr Jekyll and Mr Hyde* eftir Robert Louis Stevenson (1850-94) út. Hon snýr seg um tað modernaða, syndraða menniskjað. Søgan fer fram í London í viktoriutíðini og snýr seg um tann siðiliga og virda læknan Dr. Henry Jekyll og hansara alter ego, tann persóngjørda djevulin Mr. Edward Hyde. Dr. Jekyll hevur starvsstovu og bústað við tænastufólkum í einum stórum, hugnaligum ríkmannahúsum í West End. Men aftanfyri er ein myrkur bakgarður, og har fer Mr. Hyde inn, tá ið hann kemur aftur frá sínum ólevnaði í Soho, har hann hevur leigað sær hús til endamálið. Jekyll er sera framsøkin, og tað hevur týdning fyri hann at standa høgt í metum hjá fólki. Men samstundis hevur hann eina sterka trongd til at njóta alt tað, sum lívið hevur at bjóða, og tað letur seg ikki sameina við tær hugsjónirnar, hann byggir sítt virksemi uppá. Hann fær tí tann tankan, at tað hevði verið lættari, um tær báðar síðurnar í hansara persóni kundu verið skildar heilt sundur, soleiðis at onnur síðan kundi liva eitt lív í njóting og ólevnaði, uttan at hin síðan varð plágað av samvitskubiti ella fekk spilt sítt góða navn og umdømi. Hann hevur við rannsóknum funnið fram til, *at likam okkara, sum tykist so haldgott, er einki annað enn geislingar og glógvan frá vissum máttmiklum síðum í sálini*[8], og hann hevur framleitt ein løg, sum ger tað møguligt at taka máttin úr ávísum síðum av sálarlívinum og flyta hann yvir í aðrar síður. Harafturat er hann eisini førur fyri at broyta andlitsbragdið soleiðis, at tað, hóast tað framvegis er hansara, *bar brá av teim lágu og óndu dráttum í sál míni.*[9]

Dr. Jekyll fer undir eitt dupultlív, sum tykist lovandi. Hann er førur fyri at skapa seg umaftur, tá ið hann sum Hyde hevur fingið stillað sín tørv. Eingin uppdagar nakað, tí tá ið hann hevur drukkið løgin, og umskapanin er farin fram, er Hyde ítøkiliga upploystur. Jekyll hevur tamarhald á støðuni. Men bara eina tíð. At byrja við er Hyde lítil og veikur, og hann er eisini yngri; Jekyll forklárar tað við, at hann er nógv minni royndur í lívinum.

Trupulleikarnir koma, tá ið Hyde fer illa við eini smágentu, sum hann rennur umkoll og traðkar á, og tá ið hann drepur ein mann í illsinni. Í báðum førum eru vitni, og hóast tað eydnast honum at sleppa burtur, vita fólk nú, hvussu hann sær út, og navnið er eisini kent. Men av góðum grundum verður hann ikki funnin.

Hvussu leingi dupultlívið heldur fram, er ikki greitt, men kanska nøkur fá ár. Jekyll er frá byrjan tilvitaður um, at hetta er eitt vandamikið spæl, tí eitt evarska lítið frávik í samansetingini í løginum fer at hava vanlukkuligar avleiðingar. Men nøgdin gevur ikki altíð tað væntaða úrslitið, og tað kemur fleiri ferðir fyri, at hann noyðist at tvífalda, ja enntá trífalda hana. Við tíðini veksur megin í Hyde, og Jekyll noyðist at sanna, at hann má velja millum báðar síðurnar. Hann velur Jekyll og livir hansara í allar mátar siðiliga lív, har hann enntá roynir at bøta um tær illgerðir, hann hevur framt sum Mr. Hyde. Men ein dagin hendir tað, at broytingin fer fram av sær sjálvari. Hann hevur mist tamarhaldið á tilgongdini, og endin verður, at hann drepur Hyde og harvið seg sjálvan.

Í pørtum av romantikkinum og í romantismuni var áhugin fyri tí irrationella, fyri tí demoniska ella tí sonevndu náttsíðuni í menniskjanum stórur. Vit kunnu hugsa um verk sum *Die Elixiere des Teufels* (1815/16) eftir E.T.A. Hoffmann (1776-1822), "William Wilson" (1839) eftir Edgar Allan Poe (1809-49) og "Skuggan" (1847) eftir H.C. Andersen, sum skaldsøgan eftir Stevenson er skyld við, men sum hon eisini víkir frá. Hyde er ikki ein spegilsmynd av teimum kreftum í menniskjanum, sum vit ikki vilja kennast við, hann *er* ein fysisk vera, men á lægri menningarstigi, tí sum Jekyll sigur: ...*hetta var eisini eg*[10].

Tað paradigmuskifti, sum menningarlæran hjá Charles Darwin við *On the Origin of Species* frá 1859 og *The Descent of Man, and Selection in Relation to Sex* frá 1871 var atvoldin til, sæst aftur í skaldsøguni eftir Stevenson. Í tekstinum brúkar Jekyll orð sum "djórið" og "villdjórið innan í mær"[11] til at lýsa Hyde við, og Poole, tænarin hjá Jekyll, nevnir hann "mansling" og ber hann saman við eina apu[12]. Utterson, sakførari, sum er vinmaður Jekyll, ger sær hesar tankar um Hyde, sum hann tá akkurát hevur tosað við: *Gud forláti mær er hetta ikki menniskjanslig vera! Ein vera mitt ímillum djór og mann, ha?*[13]

Dr. Jekyll er við sínum rannsóknum komin fram til, at persónmenskan er í tvíningum. Tað verður ikki sagt beinleiðis í skaldsøguni, hvat Hyde hevst at, tá ið hann fremur sínar illgerðir. Men tað liggur implisitt í lýsingunum, at tað er tann burturtroðkaði seksualiteturin, sum verður sleptur leysur. Og bæði í tí calvinsku mentanini, Stevenson var vaksin upp í í Skotlandi, og í viktoriutíðini, sum skaldsøgan varð til í, var moralurin sera strangur. Tann hampuligi borgarin, sum ger sína skyldu og livir eitt sømiligt lív, er góður, hann ella hon, sum stígur út um teir trongu karmarnar, er óndur ella ónd.

Jekyll umboðar borgaran, sum roynir at liva upp til teir normarnar, sum samfelagið og hann sjálvur seta. Men tann parturin av honum, sum umboðar alt tað forbodna, er so sterkur, at hann má geva eftir. Hann sigur, at tað er lyndið, sum hann hevur fingið frá náttúruni, sum er upprunin til ólevnaðin hjá Mr. Hyde, og ikki óndskapur[14]. Við hesum brýtur Stevenson avgerandi við ta ráðandi, moralsku fatanina. Girndin er sambært skaldsøguni ein holdborin veruleiki, sum

menniskjað noyðist at sættast við. Jekyll hevur skomm av sínum óflýggjaskapi sum Hyde, tí hann er ósambæriligur við tað høga lívsendamálið, hann hevur sett sær, men hann er ikki hyklari, sigur hann, tí *Í báðum førum var eg fullur og heilur tað, sum eg var.*[15] Kanska ein ironisk viðmerking til tann galdandi borgaraliga dupultmoralin.

Um somu tíð, sum Stevenson skrivaði sína skaldsøgu, legði neurologurin Sigmund Freud (1856-1939) grundarlagið undir ta modernaða sálarfrøðina. Brúka vit hansara lýsing av persónmenskuni, kunnu vit lýsa Jekyll og Hyde sum ávíkavist *superego* (*yvireg*) og *id* (*tað*). *Yvireg*'ið er tann parturin av persónmenskuni, sum fortelur, hvat er rætt og skeivt, tað umboðar eitt nú moral og samvitsku. *Tað*'ið umboðar girnd og tørvir, tað er tað ótilvitaða, tann primitivi parturin. *Eg*'ið er tann stovnurin, sum skal síggja til at skapa javnvág soleiðis, at tørvsnøktanin fer fram á ein hátt, sum tryggjar menniskjanum eina tilveru í longdini.

Í skaldsøguni fær *tað*'ið sjálvstøðugt lív, og *yvireg*'ið hevur ikki longur tamarhald á tí. Men tað merkir ikki, at Jekyll, *yvireg*'ið, ikki veit, hvat fer fram, tí tað ger hann, og hann ógvast við, men hetta er bara ikki hansara ábyrgd. Hjá Stevenson er *eg*'stovnurin kroystur millum hinar báðar sterku stovnarnar. *Eg*'ið sleppur ikki at mennast natúrliga og skapa javnvág í persónmenskuni. *Yvireg*'ið forðar fyri, at tann natúrliga tørvsnøktanin fær hóskandi pláss, og tí verður úrslitið, at kreftirnar verða perverteraðar. Tað samsvarar sum longu nevnt væl við tíðina, tí tann borgaraligi moralurin viðurkendi ikki seksualitetin sum borðbæran. Men skaldsøgan peikar kortini út um tíðina í síni lýsing av persónmenskuni. Niðurstøðan hjá Dr. Jekyll er, at maðurin ikki er ein, men tveir, og hann heldur fram:

> *Eg sigi tveir, tí kunnleiki mín røkkur ikki longur enn. Men aðrir koma aftaná, og munnu leita eftir somu rás, og úrslitið, giti eg, verður, at maðurin verður kendur sum eitt pinkusamfelag við mongum ósambæriligum og sjálvstøðugum verum.*[16]

Her orðar hann á ein hátt tað, sum Freud situr og granskar í í Wien tey árini.

Tað dýnamiska bretska ríkið tekur seg fram á øllum hermótum upp gjøgnum 1800-talið, og tann ótamda liberalisman skapar eitt stættasamfelag, har fólk liva í ófatiligum ríkidømi og djúpari armóð. Skaldsøgan eftir Stevenson kann eisini lesast við sosiologiskum brillum, tí Hyde kann ímynda ta karráu kapitalismuna, sum hevur eittans endamál: at skapa vinning til tann einstaka uttan samfelagsligt atlit. Tað ástøðiliga grundarlagið finna vit t.d. hjá Herbert Spencer (1820-1903). Hann hevði ta fatan, at kapping uttan uppílegging fór at skapa framburð í longdini. Hann bygdi m.a. á ástøðið hjá Jean-Baptiste Lamarck (1744-1829) um, at tilognaðir eginleikar arvast, og hann helt seg finna tað váttað í menningarlæruni hjá Darwin. Á sama hátt sum í náttúruni fóru tey sterkastu og best skikkaðu at vinna og á tann hátt menna samfelagið. Uppílegging frá t.d. statinum fór bara at darva gongdini. Tað er vanligt at brúka hugtakið sosialdarwinisma um hesa óskipaðu liberalismuna, men Charles Darwin hevur ikki nakað við hana at gera. Hann var ikki samdur við Herbert Spencer í, at tær sokallaðu fríu kreftirnar skuldu sleppa at ráða ótarnaðar.

Skaldsøgan tykist halda tað sama. Um

sína støðu sigur Dr. Jekyll, *eg var í eini støðu uttan fyri lóg og rætt*[17], og gongdin vísir, at ein sovorðin skipan endar við at beina fyri sær sjálvari. – Sum vit, sera apropos, hava verið vitni til hetta seinasta árið!

### 3. partur

Høvuðspersónurin í stuttsøguni "Minnisvarðin" (1906) eftir Regin í Líð (1871-62) eitur Ingibjørg. Hon er dóttir Sigvald á Miklabø, ríkasta bónda í sýsluni. Øll rokna við, at Ingibjørg fer at giftast við Ólavi, soni Jógvan í Garði, sum er trímenningur Sigvald. Men Ingibjørg gongur sínar egnu leiðir. Hon letur seg tøla av tí uppgjørda Torsteini, sum hon fær ein son saman við. Ikki tí hon leggur nakað í hann, men tí hon verður drigin inn í spælið:

> *Torsteinur var júst sum rennisjógvurin, og hon leikaði við hann eins og við rennisjógvin; men leikurin hevði drigið hana longri, enn hon vildi.*[18]

Pápi hennara er ikki mildur, tá ið tað verður greitt, at hon er upp á vegin:

> *... slatrikellingarnar hava allan rættin, dóttir Sigvalds bónda á Miklabø er ein skøkja!*[19]

sigur hann við hana. Men Ingibjørg svarar aftur úr somu skuffu:

> *Nei pápi, væl er tað satt, at Torsteinur í Búð er faðir at tí barni, eg beri; men ikki eri eg skøkja, líka lítið sum tygum eru pútusveinur fyri tað, at tygum høvdu við Maritu í Búð at gera – fastur Torsteins; – ella hvør var faðir at barni hennara? – tað var kanska Hanus húskallur, sum giftist við henni?*[20]

Í tekstinum er Ingibjørg ikki nøgd við seg sjálva og tað valið, hon hevur gjørt, men í uppgerðini millum hana og pápan verður víst á, at kvinnuligur seksualitetur hevur sama rætt sum mannligur. Tað ástøðiliga grundarlagið undir hesum uppáhaldi finna vit hjá Darwin. Í *The Descent of Man...* (1871) brúkar hann ikki orðið seksualitet, hann viðger paring og tey viðurskifti, sum hoyra til tað at velja partnara, og tað er greitt, at bæði kynini hava ein leiklut.

Menningarástøðiliga velur Ingibjørg ikki skilagott, og tað veit hon av. Hon átti at valt fermenningin Ólav í Garði, tí sum teksturin sigur:

> *Ættin var av hinum fornastu í Føroyum og ikki blandað við ringari slag, tað nakar visti um at siga.*[21]

Tað hevur hon, sambært søguni, eisini hug til, í røttum darwinskum anda hugsar hon:

> *... hansara mansmegi hótti við at bergtaka kvinnuna í henni...*[22].

Ólavur uppfyllir øll tey krøv, hon í tí umhvørvi, hon er úr, kann seta til ein partnara og pápa til hennara børn.

Men menningartilgongdin kemur Ingibjørg til hjálpar og rættar so at siga hennara mistak. Hon eigur ein son, sum so við og við fer at líkjast, ikki Torsteini, sum er tann lívfrøðiligi pápin, men Ólavi. Søgan hevur fleiri frágreiðingar um hetta. Ein er, at tað var vanlig hugsan millum fólk, at eitt barn kom at líkjast tí, sum mamman hugsaði um, með-

an hon gekk við barninum. Ein onnur er ein ímyndarlig lýsing av kynsligari sameining millum Ingibjørg og Ólav, í tí hann druknar í fossinum, tá ið hann bjargar beiggja hennara undan at drukna. Ein triðja er menningarástøðilig, tey bæði eru sum nevnt fermenningar og ættin "av hinum fornastu" og "ikki blandað við ringari slag". Arvaeginleikarnir frá tí veikara Torsteini lúta við øðrum orðum í menningartilgongdini.

Menningarástøðið elvdi frá byrjan til eitt hugmyndafrøðiligt stríð, tí tá ið menniskjan hevði ment seg í einari tilgongd gjøgnum nógv hundraðtúsund ár, hvat so við skapanarsøguni í Bíbliuni? Og vit kunnu radikalisera málið við at spyrja, hvat verður av patriarkatinum, tá ið *bæði* kynini hava ment sig lið um lið? Faðirrætturin hevði longu fingið eitt avgerandi skot fyri bógvin, tá ið tað kvinnuliga eggið varð funnið í 1827, og tað varð staðfest, at bæði kynini høvdu lut í gitnaðinum. Sambært menningarástøðinum hava tey bæði kynini ment seg ymiskt við natúrligum úrvali, og tað er galdandi fyri bæði kropsligar og sálarligar eginleikar. Menn eru størri og sterkari enn kvinnur, tí teir hava noyðst at berjast fyri at vinna kvinnur og verja sítt øki, kvinnur hava verið knýttar at reproduktión og hava ment móðurinstinkt og umsorgan.

Darwin fór ikki út um lívfrøðina í sínum ástøði, men tað hava mong onnur gjørt síðan. Í 1883 gav Bjørnstjerne Bjørnson (1832-1910) sjónleikin *En Handske* út, sum umboðaði tað sjónarmiðið, at menn á sama hátt sum kvinnur áttu at vera seksuelt fráhaldandi, áðrenn teir fóru inn í hjúnalagið. Leikurin var eitt svar upp á tann galdandi dupultmoralin í borgaraskapinum, har døturnar vóru undir strongum eftirliti, meðan tær vórðu uppdrignar til rolluna sum kona og mamma. Synirnir harafturímóti sluppu at gera sínar royndir og nøkta sín kynsliga tørv hjá kvinnum úr øðrum stættum, t.d. hjá skøkjum og tænastugentum. Sjónarmiðið hjá Bjørnson elvdi til andsvar frá nógvum ymiskum síðum á tí mentanarliga pallinum í øllum Norðurlondum. Stríðið um náttúruna hjá kvinnum og monnum bleiv í 1880'unum so hart, at tað fekk heitið "tað stóra norðurlendska kríggið um seksualmoralin".

Eldur kom í av álvara, tá ið tann svenski rithøvundurin Stella Kleve (dulnevni fyri Mathildu Malling, 1864-1942) hevði almannakunngjørt stuttsøguna "Pyrrhussegrar" (1886) í tí radikala, gøteborgska tíðarritinum *Framåt*. Søgan snýr seg um ta 24 ára gomlu Märtu Ulfklo, sum er á einum kursentri í Montreux. Hon hevur tuberklar, og hevur frá sínum lækna heima í Stockholm fingið tey greiðu boðini, at hon fer at doyggja. Frágreiðingin er *ärftliga disposition, förvärrad av ett alltför hetsigt blod*[23]. Hon er sjálvandi fyri ongum og skilir ikki hetta, tí sum barn hevur hon altíð hevði verið frísk, og hon hevur tvær systrar, sum eru giftar. Og teksturin heldur fram:

> *– Som är gift – ja. Det är ... det är, som sagt blodet, det hetsiga blodet –*
>
> *Hon skulle velat slå den gamle mannen, som han stod där med sina nedslagna ögon och sitt leende.*
>
> *– Varenda ballnatt, fröken Märta, varenda dans har varit bränsle på elden. Och alla de erotiska fantasier – – –*
>
> *– Som jag kvävt. Hon kunde höra råheten i sin egen stämma.*
>
> *– Mycket riktigt – som ni "kvävt". Det er just det tokiga, det. Det har varit farliga segrar de där, fröken, – rent ödeläggende för en sådan fysik.*

*Farliga, dyrköpta segrar – Pyrrhussegrar! Hon kunde räkna dem på fingrarne, nämna dem vid namn, dessa "erotiska fantasier", som hon väl betvungit, men i en kamp, som kostade all hennes livskraft. Och icke ens nu lämnade de henne i fred – inn i döden förföljde de henne.*[24]

Høvuðspersónurin doyr, tí hon hevur noyðst at halda sínum seksualiteti niðri, og søgan umboðar ta áskoðan, at tað er sjálvur tann ráðandi, borgaraligi kynsmoralurin, sum er drepandi. Gølan, sum søgan hevði við sær, kom bæði av evnisviðgerðini og av stílinum, har ein kvinnuligur rithøvundur loyvdi sær at lýsa mannfólkakroppin við sansaligum, erotiskum orðalagi.

Eisini um samfelagsviðurskifti var hart stríð í seinnu helvt av 19. øld. Kvinnurnar vóru í øllum viðurskiftum undirlagdar valdinum hjá monnum, tær høvdu ikki atgongd til útbúgvingarstovnar, ikki ræðisrætt yvir síni egnu ogn, ikki valrætt o.s.fr. Ein undangongukvinna í stríðnum fyri einum javnstøðusamfelagi var Mary Wollstonecraft (1759-1797). Hon skrivaði í 1792 *A Vindication of the Rights of Women*, har hon førdi fram, at kvinnur áttu at hava somu rættindi sum menn, búskaparliga, sosialt og politiskt. Hon heldur uppá, at maðurin ikki natúrliga eigur rættin til at ráða, men at tað er vantandi atgongd til útbúgving, sum forðar kvinnuni í at mennast. Mary Wollstonecraft var ov tíðliga á veg við sínum hugsanum, men so við og við broyttist hugburðurin, so hvørt sum framstig hendu innan fyri tær ymisku náttúruvísindagreinirnar.

Eitt framhald av teimum víðgongdu sjónarmiðunum hjá Mary Wollstonecraft, og eitt tað fyrsta av sovorðnum slagi sum ein maður hevur skrivað, er *The Subjection of Women* frá 1869[25] eftir John Stuart Mill (1806-73), sum lýsir støðuna hjá kvinnuni í patriarkatinum og grundgevur fyri, at kvinnur skulu fáa somu rættindi sum menn á øllum økjum, eisini valrætt. Hvat kvinnur eru, ynskja og duga, kunnu menn sambært honum ikki vita nakað um, tí tvey fólk kunnu ongantíð koma at kenna hvør annan til fulnar, uttan so at tey eru á jøvnum støði. Kvinnan er ald upp til, at hennara fremsta skylda er at tæna manninum og laga seg eftir hansara tørvi og ynskjum. Hon hevur tí ongantíð verið í einari støðu, har hon á frælsum grundarlagi hevur kunnað lýst síni sjónarmið. So leingi hesi valdsviðurskiftini verða verandi óbroytt, fær maðurin onga veruliga fatan av, hvør kvinnan er, ella hvørjar møguleikar hon hevur fyri at mennast, og samfelagið missir teir menningarmøguleikar, sum kvinnurnar, t.e. helvtin av fólkinum, kundu givið.

Venda vit nú aftur til "Minnisvarðan" eftir Regin í Líð, so hava vit sæð, at Ingibjørg fer út um rammurnar í tí borgarliga moralinum, tá ið hon í uppgerðini við pápan heldur uppá, at hennara seksuelli atburður ikki eigur at verða mettur øðrvísi enn hansara. Men søgan fer víðari. Tí Ingibjørg tekur virknan lut í skapanini, tað eru arvaeginleikar úr hennara ætt, sum vinna í menningini, og tá ið sonurin verður doyptur, gevur hon honum navnið Ólavur. Tað hugmyndafrøðiliga yvirvaldið, kirkjan, góðkennir á tann hátt súmbolskt tann faðirskapin, sum hon hevur valt.

Men hví tók hon ikki Ólav av fyrstan tíð, kunnu vit spyrja. Sum vit hava sæð, kendi hon seg drigna at honum:

*… hansara mansmegi hótti við at bergtaka kvinnuna í henni…*

men teksturin heldur fram:

> *... hennara stórlátna sinni bardist móti slíkari undirgeving.*[26]

Ingibjørg verður lýst sum ein sterk og sjálvstøðug kvinna, og hóast støðan á summum økjum var broytt, síðan Stuart Mill skrivaði um viðurskiftini, so hevði tann gifta kvinnan um fyrra aldarskifti ikki fullan ræðisrætt yvir sínum egnu viðurskiftum løgfrøðiliga, og als ikki sosialt og hugmyndafrøðiliga. Støðan sum gift bóndakona hevði framvegis havt við sær, at ein gav seg inn undir patriarkalskt vald. Tann møguleikin, sum Stuart Mill grundgevur fyri, nevniliga at kvinnur og menn liva í javnstøðu, er ikki realistiskur í tí søguliga kontekstinum.

## 4. partur – samanfatan og útlit

"Móðurmerkið", *Dr. Jekyll og Mr. Hyde* og "Minnisvarðin" viðgera á ymiskan hátt m.a. evnið menniskja, náttúra og samfelag. Í stuttsøguni "Móðurmerkið" sigur Aylmer, at tað móðurmerkið, sum kona hansara hevur á kjálkanum, er *tekin um verðsligt ófullkomni*[27]. Í romantiskari hugmyndafrøði er tann guddómliga skapanin fullkomin og lýtaleys, og Aylmer kann ikki góðtaka, at kona hansara ikki speglar hesa guddómligu hugmyndina. Sum vit hava sæð í 1. parti, ber sambært Immanuel Kant ikki menniskjanum til at fáa vitan um tað absolutta, tað er handan okkara møguleikar fyri sannkenning. Men tað, sum Aylmer ger, er at flyta myndina frá tí guddómligu, makrokosmisku skipanini yvir á veruleikans mikrokosmos, har hann sjálvur verður skapari og evsti myndugleiki.

Við einum parti av sær sjálvum veit Aylmer av, at hann er á tunnum gleri. Tað kemur fram í einum marrudreymi, har hann við skurðviðgerð roynir at skera móðurmerkið burtur. Men djúpari hann sker, djúpari søkkur hondin, og tað endar við, at hondin sýnist at taka um hjartað á Georgianu. Søgan er skrivað, áðrenn Sigmund Freud greinaði menniskjasálina, og tað, sum dreymurin umboðar, verður lýst soleiðis:

> *Hugin er í eini undarligari støðu, tá ið svøvnurin, tann alfevndi, ikki megnar at steingja sínar dreygar inni í sínum myrka ríki, men letur teir bróta út og loypa ræðslu á tað veruliga lívið við loyndarmálum, sum kanska hoyra heima í eini djúpari tilveru.*[28]

Við hesum verður sett spurnartekin við tey ediligu motivini hjá Aylmer. Tá ið hann vil skapa ta fullkomnu kvinnuna og samstundis er til reiðar at seta lívið hjá henni í váða, er tað ikki hon, men hann, sum er miðdepilin. Hon er gjørd til objekt í eini ætlan, sum hevur til endamáls at nøkta hansara subjektivu, sjálvsøknu ærutrá.

Georgiana verður lýst sum eitt dømi um ta borgaraligu kvinnuna í 19. øld, sum vit sóu í lýsingini hjá John Stuart Mill, og sum hevur sum lívsendamál at tekkjast manninum. Georgiana sigur sjálv um móðurmerkið: *Fyri at siga sum er, so hava fólk ofta sagt mær, at tað fríðkaði um meg, ...*[29], og seinni verður sagt, at merkið gjørdi summar menn uppaftur meira hugtiknar[30]. Heldur enn at vera eitt lýti er tað lítla merkið tað, sum ger hana serstaka. Meðan tey vóru forlovað, hevði Aylmer ikki hugsað nakað serligt um merkið, tað var ikki, fyrr enn tey vóru gift, hann ansaði eftir tí, og tá fekk tað alt avgerandi týdning. Seint og tíðliga minnir hann hana á

evnið, og et enda biður hon hann sjálv taka tað burtur:

> *... lat royndina verða gjørda, kosti hvat tað kann. Vandan ræðist eg ikki; tí so leingi hetta ótespiliga merkið fær teg at øtast og vamlast, er lívið mær ein byrða, sum eg við gleði vildi blaka av mær. Bein hesa ræðuligu hondina burtur, ella tak mítt ússaliga lív!*[31]

Hon sær ikki seg sjálva við sínum egnu eygum, men við hansara. Er hon einki verd í hansara eygum, eigur hon ongan tilverurætt.

Móðurmerkið er ikki eintýtt sum súmbol í søguni. Men tá ið tað verður sagt, at Aylmer ikki ansar eftir tí fyrr enn eftir hjúnalagið, kann *ein* tulking vera, at tað ímyndar tað kropsliga ella seksualitetin, t.d. stendur í tekstinum, at Aylmer valdi

> *at síggja móðurmerkið sum ímynd av, at kona hansara var bundin at synd, sorg, forfalli og deyða.*[32].

Sambært tí patriarkalsku hugmyndafrøðini í 19. øld hevði tann borgaraliga kvinnan ongan seksualitet, hon var ein madonnukend vera, sum var objekt, ikki subjekt í sínum egna lívi.

Tað er m.a. á hesum baksýni, vit skulu síggja naturalismuna, sum "Minnisvarðin" eftir Regin í Líð er dømi um. Ingibjørg umboðar sum týpa ta nýggju tíðina. Í uppgerðini við pápan avdúkar hon tann ráðandi moralin sum eitt amboð hjá patriarkatinum til at varðveita eina samfelagsskipan, sum ikki tekur støði í natúrligum eginleikum hjá menniskjanum, men sum er hugmyndafrøðiliga grundað.

*Dr. Jekyll og Mr. Hyde* lýsir eitt puritanskt samfelag, har sambandið millum kynini er so burturtroðkað, at kvinnan als ikki er til staðar. Dr. Jekyll avnoktar náttúrukreftirnar í sær sjálvum við tí úrsliti, at tær koma undan í perverteraðum skapi. Sum í "Pyrrhussegrar" hevur tað deyðiligar avleiðingar at binda náttúruna niður.

Sum longu víst á, leikaði hart á á øllum mentanarligum og samfelagspolitiskum økjum upp gjøgnum 1800-talið, og vísindalig framstig løgdu bumbur undir samtyktar "sannleikar". Við menningarástøði sínum skapti Charles Darwin eitt paradigmuskifti, og vit skulu heilt aftur til ta heliosentrisku kosmologiina eftir Nikolaus Kopernikus (1473-1543) fyri at finna eitt ástøði við so kollveltandi avleiðingum. Tann kopernikanska skipanin avtók himmalin, og menningarástøðið prógvaði, at Gud ikki hevði skapt alt lív á jørðini eftir seks døgum, men at tað var ment við natúrligum úrvali gjøgnum milliónir av árum.

Hugmyndafrøðiliga hevur *Bíblian* altíð verið eitt sterkt amboð í hondunum á tí ráðandi patriarkatinum. Sambært 1. Mósebók hevur Gud skapt menniskjuna í sínum bílæti, og kvinnuna hevur hann skapt úr einum rivjabeini frá manninum. Í øllum viðurskiftum skal kvinnan vera manninum lýðin, tað er Guds vilji, sum Paulus og aðrir siga. Nú kemur so Darwin og prógvar, at menniskjan er skapt gjøgnum eina langa menningargongd, at talan ikki er um eina guddómliga ætlan. Hvussu ávirkar tað støðuna hjá kynunum í samfelagnum? Í fyrstu syftu verður menningarástøðið í hesum samanhangi brúkt til at staðfesta tað patriarkalska valdsmonopolið: maðurin er størri og sterkari, eisini heilin er størri, so tað er *natúrligt*, at hann ræður.

Men sum tíðin gongur, koma nýggj granskingarúrslit, samfelagið verður støðugt meira komplekst, tørvurin á útbúnum fólki veksur, brúk er fyri øllum kreftum, bæði kvinnum og monnum. Gongdin hevur m.a. havt við sær, at tað ikki er tann kropsliga styrkin, sum er avgerandi fyri, hvussu væl skikkað eitt fólk er til eitt ávíst arbeiði, nýggj tøkni krevur serútbúgvin fólk. Granskingin innan fyri sálarfrøði og neurologi hevur kollvelt okkara mynd av persónmenskuni. Menn og kvinnur eru framvegis ymisk, men tað ber ikki til at brúka vísindini til at grundgeva fyri, at maðurin skal vera betur skikkaður til at stýra á nøkrum øki. Tvørturímóti er eitt nú tann amerikanski sálarfrøðingurin Howard Gardner (f. 1943) komin fram til eitt ástøði, sum sigur, at øll menniskju hava sjey sløg av intelligensi, sum eru ment ymiskt og sett saman ymiskt frá fólki til fólk, men tað er ikki kynið, sum er tað avgerandi. Robert Louis Stevenson var á rættari leið, tá ið hann í *Dr. Jekyll og Mr. Hyde* segði, at

> *maðurin verður kendur sum eitt pinkusamfelag við mongum ósambæriligum og sjálvstøðugum verum.*[33]

Men tann siðbundna hugmyndafrøðin hevur sterkar røtur í okkara mentan, tí tá ið samanum kemur, snýr tað seg ikki um vitan og sannleikar, tað snýr seg um tamarhald og vald, og í so máta er støðan ikki nógv broytt, hóast amboðini ikki eru tey somu. Síðan tann kopernikanska heimsmyndin flutti Gud og himmalin niður á jørðina, er, sum vit hava sæð, ein verjugarður fyri og annar eftir í tí patriarkalska verndarvirkinum fallin. So hvat er til ráðar at taka? *Intelligent design*. Tá ið skapanarsøgan í *Bíbliuni* ikki verður viðurkend sum kelda til at greina lívsins uppruna, tí hon ikki byggir á vísindaligt grundarlag, so er næsta stig at *gera* hana vísindaliga. Í USA hava verið fleiri rættarmál um henda spurning, enntá í hægstarætti. Tað seinasta var í Dover í Pennsylvania í 2005[34]. Sakin kom av, at foreldur til næmingar í einum skúla í býnum ikki vildu góðtaka, at *intelligent design* skuldi leggjast fram sum vísindaliga grundað alternativ til menningarástøðið eftir Darwin. Dómurin varð ein ósigur afturat fyri *intelligent design*-viðhaldsfólkini, og grundgevingin var tann sama sum áður: *intelligent design* er ikki vísindaliga grundað, tað er ein átrúnaðarlig konstruktión.

Higartil hevur tað ikki eydnast at troðka menningarlæruna úr skúlunum, men royndirnar halda fram, bæði í Amerika og Europa. Nýliga, í 2006, hava viðhaldsfólkini fingið stuðul fra fundamentalistiskari, islamiskari síðu. Ein turkiskur rithøvundur og handilsmaður[35] hevur sent eina bók ókeypis til skúlar og stovnar í nógvum londum, har menningarlæran verður lýst sum eitt falsum. Fær *intelligent design* innivist á skúlum og lærdum stovnum og verður viðurkent sum ástøði á jøvnum føti við vísindalig ástøði sum menningarlæruna, venda vit hugmyndafrøðiliga aftur til miðøldina og noyðast at byrja umaftur.

## Bókmentir


Brix, K. 2002. *Dialog i Babelstårnet*. Føroya Fróðskaparfelag. Supplementum XXXIV.

Buskes, C. 2008. *Evolutionär denken*. Primus Verlag.

Dahlerup, P. 1983. *Det moderne gennembruds kvinder*. Gyldendal.

Darwin, C. 2008: *Arternes oprindelse*. (1859). Jørgen Paludans Forlag.

Darwin, C. 1909: *Menneskets Afstamning og Parringsvalget*. (1871). Gyldendalske Boghandel

Nordisk Forlag.
Nordisk kvindelitteraturhistorie. Bind II: Faderhuset. 1800-tallet. 1993. Red. Inger-Lise Hjordt-Vetlesen. Rosinante.
Kleve, S. 1993: ”Pyrrhussegrar” (1886). *Synd. Noveller från kvinnornas moderna genombrott*. Red. Birgitta Ney. Ordfront.
Líð, Regin í. 2003: ”Minnisvarðin”. R.í L.: *Glámlýsi*. Føroya Skúlabókagrunnur.
Hawthorne, N. 2002. ”Móðurmerkið”. *Tað nýggja Atlantis*. Vísindaskaldskapur og furða. Hanus Kamban valdi og týddi. Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunnur.
Jørgensen, D. 2001. *Skønhedens metamorfose*. Odense Universitetsforlag.
Mill, J. S. 1869. *Kvindernes Underkuelse*. Gyldendal.
Stevenson, R. L. 1955/56. *Dr. Jekyll og Mr. Hyde*. (1886). Týðing eftir Jóhannes av Skarði. *Gluggin*, 1. árgangur, nr. 1-10.
Strager, H. 2009. *Som at tilstå et mord*. Gyldendal.
*Tankens magt I-III*. 2008. Red. H.S. Jensen, O. Knudsen og F. Stjernfelt. Lindhardt og Ringhof Forlag.

Fyrilestur hildin í Fróðskaparfelagnum 5. august 2009 í sambandi við Darwin-árið.

## Notur

[1] *Tað nýggja Atlantis*, s. 16
[2] *Tað nýggja Atlantis*, s. 16f
[3] *Tað nýggja Atlantis*, s. 12
[4] *Tað nýggja Atlantis*, s. 12
[5] *Tað nýggja Atlantis*, s. 15
[6] *Tað nýggja Atlantis*, s. 17
[7] *Tað nýggja Atlantis*, s. 18
[8] *Gluggin* nr. 8, s. 13
[9] *Gluggin* nr. 8, s. 13
[10] *Gluggin* nr. 8, s. 17
[11] *Gluggin* nr. 10, s. 16
[12] *Gluggin* nr. 6, s. 14
[13] *Gluggin* nr. 2, s. 29
[14] *Gluggin* nr. 8, s. 13
[15] *Gluggin* nr. 8, s. 13
[16] *Gluggin* nr. 8, s. 13
[17] *Gluggin* nr. 9, s. 12
[18] *Glámlýsi*, s. 23
[19] *Glámlýsi*, s. 34
[20] *Glámlýsi*, s. 34
[21] *Glámlýsi*, s. 18
[22] *Glámlýsi*, s. 22
[23] *Synd*, s. 141
[24] *Synd*, s. 142
[25] Kom út í 1870 í danskari týðing eftir Georg Brandes.
[26] *Glámlýsi*, s. 22
[27] *Tað nýggja Atlantis*, s. 10
[28] *Tað nýggja Atlantis*, s. 14
[29] *Tað nýggja Atlantis*, s. 10
[30] *Tað nýggja Atlantis*, s. 12
[31] *Tað nýggja Atlantis*, s. 15
[32] *Tað nýggja Atlantis*, s. 12
[33] *Gluggin* nr. 8, s. 30
[34] Strager s. 175
[35] Strager s. 178